## Mótmæla hvalveiði

Avstralska stjórnin hóttir nú við at leggja sak ímóti Japan, sum landið ikki gevst við at veiða stórhval í Suðurhøvum. Tað var Stephen Smith, uttanríkisráðharri, sum kom við hóttanini um vikuskiftið. Við tíðindastovuna Sky segði hann, at kemur stjórnin til ta niðurstøðu, at hetta málið kann ikki loysast við vanligum diplomatiskum arbeiði, fer hon at umhugsa at draga Jaspan fyri altjóða dómstól. Sjálvur helt hann, at eitt mál sum hetta kann koma fyri altjóða dómstólin ella havrættardómstólin. Japan hevur givið sær sjálvum rætt til at veiða 850 sildrekar í Suðurhøvum til vísindalig endamál hóast hvøss mótmæli úr fleiri londum, serliga Avstralia og Ný Sælandi.



## Stuðul til hóttar bygdir

Allir tinglimirnir atkvøddu fyri, tá grønlendska Landstingið fríggjadagin atkvøddi um eitt uppskot um stuðul til bygdir, sum verða meint raktar, tí landingarstøðir lata aftur. Eftir samtyktini verða 20 milliónir krónur játtaðar arbeiðsskapandi tiltøk og til endurútbúgving í 16 bygdum og býum, har vandi er fyri, at landingarstøðirnar lata aftur. Tað nýggja landsstýrið hevur boðað frá, at tað fer at seta ein arbeiðsbólk, sum skal koma við uppskoti um, hvussu stuðulin til bygdirnar skal skipast í framtíðini. Arbeiðsbólkurin, sum skal leggja síni úrslit fram seinni í ár, skal eisini kanna møguleikarnar fyri alternativum vinnugreinum, sigur grønlendska kringvarpið, KNR.

*Lagt til rættis: Eirikur í Jákupsstovu*

# Køld og serlig útoyggjastev



## Onkustaðni skal lívið livast

Á Trøllanesi helt Øssur Wintereig røðu undir heitinum, onkustaðni skal lívið livast. Hann greiddi millum annað frá, tá hann hevði verið á útoyggj einaferð og ein kona staðfesti, at heimføði er eitt orð, sum er uppfunnið í Havn. Somuleiðis staðfesti hann, at lívið skal livast onkustaðni, og tað er ikki nóg mikið bara at kunna yvirliva í dagsins samfelag. Tí heldur hann, at tey, ið vilja búgva á útoyggj skulu hava møguleika til tað, tí onkustaðni skulu fólk vera, um tey eru í Tórshavn, New York ella á Trøllanesi.



**Hvørt ár verður skipað fyri útoyggjastevnu og í ár var hon í Kalsoynni. Bygdirnar Mikladalur og Trøllanes vóru karmar fyri tiltakinum. Tað var kalt í norðara endanum av Føroyum leygardagin, men hugnin var serligur**

Gunvá við Keldu, sum nú er borgarstjóri í Mikladali og Trøllanesi, setti útoyggjastevnuna. Í setanarrøðuni vísti hon á, hvussu trupult lívið í útoyggj ofta er, samstundis sum hon greiddi frá ymisku sagnunum, ið hoyra til Kalsoynna. Eisini greiddi hon frá, at truplu umstøðurnar á útoyggj ikki eru nakað nýtt fyribrigði.

- Nú hendan útoyggjastevnan verður sett her í Mikladali, er tað hóskandi at sitera ein av lokalu monnunum her á staðnum.

Í 1978 skrivar Líggjas Eliasen, sáli, um hesi viðurskifti í einum av sínum ritum, sum Jákup Marnar Anthoniussen í løtuni arbeiðir við at savna í bók. Sostatt eru góð 30 ár síðan, at Líggjas skrivar soleiðis:

»Í hesum døgum sita tingmenn og gera nýggja fíggjarlóg fyri 1978/79. Væl hevði verið, um sitandi landstýrið nú av álvara sýndi at teirra miðvísi bygdarmenningarpolitikkur eisini røkk út á óhøgligu smáplássini.«

Síðan hesi orð vórðu søgd, er støðan hjá útoyggjunum tíverri versnað, og tey eru tí enn meira viðkomandi í dag enn nakrantíð fyrr, segði hon millum annað.

Hon endaði røðuna við at siga, at parturin á útoyggjunum, at ríka landið hevur ongantíð ligið eftir. Og at Nú eiga aðrir partar at gera sítt.



*Út á seinnapartin varð farið til Trøllanes, har seytjan sangarar, leiddir av Jógvani við Keldu, sungu.*

